## Børn skriva ummæli

Býarbókasavnið skipar í summar fyri ummælarakapping fyri børn. Øll børn frá 2. til 10. flokk í fólkaskúlanum kunnu taka lut í kappingini. Sagt verður, at tað hevur ikki týdning, hvørjum máli bøkurnar eru á, og eisini er loyvt hjá børnunum at senda inn fleiri ummøli. Freistin at senda inn ummæli er tann 16. august, og verður drigið millum trý gávukort til bókahandil millum tey, sum hava sent inn.



## Umvæla skúlan á Trøllanesi

Arbeiðið við at umvæla skúlan á Trøllanesi fer nú ígongd. Tað skrivar Klaksvíkar Kommuna á heimasíðu sínari. Seinastu árini er ein partur av játtan býráðsins brúktur til hetta umvælingararbeiði. Takið og vindeyguni eru skift, og nýggjur ketil settur í. Innveggirnir eru tiknir niður fyri at kunna bjálva teir. Eisini eru gólvini tikin upp fyri at bjálva og leggja nýtt. Fyri at fáa ferð á arbeiðið, søkti Klaksvíkar Kommuna fyri í ár Innlendismálaráðið um stuðul til útoyggjamenning. Innlendismálaráðið hevur nú játtað 70.000 krónur til liðugtgerðina.

# Øvugta meining um kravið av Tvøroyri

**Løgfrøðingar hjá landsstýrinum hava akkurát beint øvugta meining um, antin Smyril skal betala havnargjald ella ikki og higartil hevur landsstýrið lurta eftir tí, sum sigur nei**

STEVNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@ssialurin.fo*

Løgfrøðingar eru alt annað enn samdir í, um Tvøroyrar Kommuna hevur rætt til at betala havnargjald fyri Smyril, tá ið hann siglur inn ella út eftir Trongisvágsfirði, soleiðis sum vit greiða frá í hinari greinini her á síðuni.

Løgfrøðingarnir hava enntá beint øvugta meining um málið, tí onkur heldur, at Smyril skal ikki betala havnargjald, men aðrir siga, at ongin ivi er um, at Smyril skal betala.

Tað er Vinnumálaráðið, sum umsitur Strandferðsluna, men innlendismálaráðið umsitur føroysku havnirnar.

Og hesi bæði ráðini hava hvør sær roynt at fáa greiði á, um Smyril skal betala havnargjald á Trongisvágsfirði ella ikki.

Og tey koma til beint øvugta niðurstøðu.



*Løgfrøðingar, sum landsstýrið hevur leitað sær ráð hjá, eru grundleggjandi ósamdir um kravið frá Tvøroyrar Býráðið um, at Smyril skal betala havnargjald fyri at brúka Trongisvágsfjørð tá ið hann siglur til og frá Krambatanga*

Løgfrøðingur, sum vinnumálaráðið hevur spurt, sigur, at Smyril skal ikki betala Havnargjald, men løgfrøðingur, sum innlendismálaráðið hevur spurt, sigur, at sjálvandi skal Smyril Betala havnargjald

Men sum tað sæst í greinini omanfyri, hevur landsstýrið higartil bara lurtað eftir løgfrøðinginum, sum sigur nei.

### Landið bæði vald og gjald

Vinnumálaráðið vísir til, at tað er landið, sum hevur bygt samferðsluhavnina á Krambatanga og sum skal halda hana.

Ráðið staðfestir, at tá ið havnin á Krambatanga varð gjørd, varð upplýst í viðmerkingunum til lógina, at talan er um eina landshavn. Upplýst varð eisini, at hetta fór at hava fíggjarligar avleiðingar fyri Tvøroyrar Kommunu, tí hon missir havnargjaldið við tað, at siglingin á kommunalu havnina á Drelnesi verður niðurløgd.

Sostatt kann landið ikki rinda havnargjald fyri Smyril, fyrrenn Løgtingið hevur samtykt eina nýggja lóg um hetta.

### Blanda tvey hugtøk saman

Men hesum er ein løgfrøðingur, sum innlendismálaráðið hevur spurt, alt annað enn samdur í.

Hann staðfestir, at Tvøroyrar Kommuna hevur fullan rætt til at krevja øll gjøld, sum hoyra havnum til, sama hvør eigur samferðsluhavnina á Krambatanga.

Hann kallar tað beinleiðis eitt løgfrøðiligt skammlop, tá ið ognarviðurskiftini á Krambatanga og rætturin til at krevja havnargjald, verða tengd saman, tí ognarviðurskiftini til bryggjukantin og havnargjaldið eru hvør sítt.

Hann vísir eisini til, at Strandferðslan betalir havnargjald til Tórshavnar Kommunu og landið hevur annars goldið sín part av næstan øllum havnum í landinum.

Fyri at allar havnir tí skulu vera javntsettar, eigur Strandferðslan at betala havnargjald allastaðni, har hon siglur.

Løgfrøðingurin sigur, at havnargjald eru ásett fyri at gera kommunurnar førar fyri at byggja og reka havnaøkið og fyri at gera tær førar fyri at halda eitt ávíst støði, tá ið skip skuku avgreiðast, eisini á trygdarøkinum.

Tað eru eisini kommunurnar, sum, í fyrsta umfari, bera allan vandan, tá ið vanlukkur og skaðar henda og upptakið av tí kann mangan vera ótespuligt og kostnaðarmikið.

# Krevja 14 milliónir frá Strandferðsluni

**Tvøroyrar Býráð hevur nú endaliga samtykt at stevna Strandferðsluni eftir havnargjaldi fyri Smyril og stevnt verður eftir fullari upphædd**

STEVNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@ssialurin.fo*

Nú hevur Tvøroyrar Býráð mist tolið við Strandferðsluni og landsstýrinum.

Í fleiri ár hevur Tvøroyrar Býráð roynt at fáa Strandferðsluna og landsstýrið at góðtaka, at Smyril eigur at betala havnargjald fyri at brúka Trongisvágsfjørð á veg til og frá Samferðsluhavnini á Krambatanga.

Men landsstýrið tvíheldur um, at Smyril eigur ikki betala havnargjald.

Tvøroyrar Býráð tvíheldur um, at Smyril skal betala havnargjald og tí hevur býráðið samráðst við fleiri av teimum seinastu landsstýrisfólkunum, sum hava umsitið málið í landsstýrinum, men alt til fánýtis.

Men nú kemur málið so til skarpskeringar, tí á býráðsfundi hevur Tvøroyrar Býráð nú endaliga samtykt at stevna eftir upphæddini.

### Miseydnað í fleiri ár

- Vit hava roynt í fleiri ár at fáa eina avtalu við skiftandi landsstýrisfólk um havnargjald fyri Smyril, men til fánýtis og sostatt er onki hjá okkum at gera, uttan at stevna, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri.

Hann sigur, at høvdu samráðingarnar við landsstýrið borið á mál, hevði tað uttan iva borið til at samst um eina skipan, har Strandferðslan fekk avsláttur, tí at Smyril brúka Trongisvágsfjørð so oftani.

- Men tá ið allar semingsroyndir eru miseydnaðar, hava vit stevnt eftir fullari upphædd.

Kristin Michelsen sigur, at sostatt er nú endaliga gjørt av at stevna Strandferðsluna eftir 14 milliónum krónum.



*- Tað sær ikki út til, at landsstýrið vildi finna semju og tí verður stevnt eftir fullari upphædd, sigur Kristin Michelen, borgarstjóri á Tvøroyri, sum her er fangaður ímeðan hann gevur seyðinum. Í baksýninum sæst Smyril fara frá á Samferðsluhavnini á Krambatanga*